# KANNING

# UM

# FELAGS FRAMHALDSDEILD

26. apríl 2016

# INNIHALDSYVIRLIT

**1.0 Niðurstøða ... 3**

**2.0 Grundarlag ... 5**

2.1 Verkætlanarbólkur ... 5

2.2 Arbeiðssetningur ... 5

2.3 Tíðarætlan ... 6

**3.0 Lýsing av møguligum samstørvum við Runavík og Klaksvík ... 7**

3.1 Næmingagrundarlag ... 7

3.2 Læraratoymi – herundir fakliga umhvørvið hjá lærarum ... 9

3.3 Evt. íløgur ella kostnaður av samstarvi ... 10

3.4 Skúlabarnaflutningur ... 12

3.5 Ávirkan og ábyrgd í einum møguligum samstarvi ... 13

3.6 Lærugreinaútboð ... 14

## 1.0 Niðurstøða

Verkætlanarbólkurin hevur kannað møguleikar fyri samstarvi um felags framhaldsdeild við Runavíkar ella Klaksvíkar kommunu og samanborið ítøkiligu viðurskiftini, sum eru kannað, við viðurskiftini í núverandi samstarvi við Fuglafjarðar kommunu. Bólkurin hevur, eins og í øðrum kanningum, ikki havt stundir at fara í smálutir og gjørt gjøllar kanningar, men heldur seg tó kunna geva eitt veruleikakent boð um møguleikarnar í einum samstarvi um felags framhaldsdeild við Runavíkar ella Klaksvíkar kommunu.

Í hesi kanningini hava vit brúkt upplýsingar frá tí arbeiði, sum er gjørt higartil í sambandi við framhaldsdeildina. Harumframt hevur verkætlanarbólkurin fingið til vega upplýsingar frá skúlaleiðslunum í Fuglafjarðar skúla, Runavíkar skúla og Skúlatrøð, bæði skrivliga og á fundum við skúlaleiðslurnar hvør sær.

Samanumtikið vísir kanningin, at øll trý samstørvini geva nøkulunda somu møguleikar innan lærugreinaútboð, meðan munurin kemur til sjóndar innan ábyrgd og ávirkan og íløgutørv.

Størri framhaldsdeildin er, minni eru sannlíkindini fyri at fáa javnbjóðis ávirkan og ábyrgd. Hendan ávirkan og ábyrgd fæst í stóran mun gjøgnum felags íløgur og umboðan í skúlastýrinum.

Í sambandi við íløgutørv kann roknast við, at útbyggingin í Klaksvík, sum verður liðug í 2018, nøktar hølistørvin, eisini hjá framhaldsdeildini í Eysturkommunu. Í Runavík kann roknast við, at neyðugt verður við eini útbygging við Løkin, um framhaldsdeildin skal gerast partur av skúlanum har. Um hildið verður fast um verandi samstarv verður eisini neyðugt við eini íløgu í Fuglafirði.

Hvat viðvíkur læraratoymum og fakliga umhvørvinum hjá lærarunum, er hetta serliga tengt at, hvussu einstaki skúlin skipar sínar deildir. Tó skal nevnast, at fleiri lærarar eru, fleiri gerast møguleikarnir fyri at stigbýta undirvísingina í einstøku lærugreinunum.

Í mun til skúlabarnaflutning eru væl skipaðar farleiðir til Fuglafjarðar og Klaksvíkar. Um næmingarnir skulu til Runavíkar, verður neyðugt at skipa egna bussleið, og fer hetta helst at geva fleiri útreiðslur fyri Eysturkommunu.

Samanumtikið vísir kanningin, at tað er møguligt at samstarva um framhaldsdeildina, bæði við Runavík og Klaksvík. Við grundarlagi í kanningini, sum arbeiðsbólkurin hevur gjørt, er tó ilt at síggja eyðsýndar fyrimunir í hesum samstarvsmøguleikum, í mun til verandi samstarv við Fuglafjørð. Tó gevur eitt møguligt samstarv við Klaksvíkar kommunu helst tann fyrimun, at tað ikki verður neyðugt við íløgum hjá Eysturkommuna fleiri ár frameftir.

Tað er týdningarmikið at hava í huga, at møguleikarnir fyri eini framtíðar framhaldsdeild so ella so koma at gerast úrslit av samráðingum millum Eysturkommunu og eina ella fleiri aðrar kommunur.

Verkætlanarbólkurin

Gamli summarmáli, tann 26. apríl 2016

| | |
|---|---|
| Margareth Djurhuus | Dánjal Eysturstein |
| Oluffa Hammer | Páll Isholm |
| Mariann Poulsen | Ove Heinesen |

## 2.0 Grundarlag

Eysturkommuna hevur síðani á vári 2014 arbeitt við at kanna framtíðar samstarvsmøguleikar innan framhaldsdeildina.

Ymiskir bólkar hava arbeitt við evninum, og nú ynskir Eysturkommuna at kanna møguleikarnar fyri samstarvi um felags framhaldsdeild saman við Runavíkar ella Klaksvíkar kommunu.

Tilfarið, sum er gjørt í hesi kanningini, er gjørt við støði í tilmælinum um framhaldsdeildina frá 30. juni 2014 og kanningini um felags skúlabygnað frá 24. juni 2015.

Orsakað av, at fleiri viðurskifti í Fuglafjarðar skúla eru broytt síðani 2014 og 2015, hevur verkætlanarbólkurin valt at gera dagført tilfar fyri Fuglafjarðar skúla. Ítøkiligu viðurskiftini í arbeiðssetninginum eru sostatt lýst soleiðis, at til ber at samanbera ítøkiligu viðurskiftini fyri Runavík, Klaksvík og Fuglafjørð. Harvið er grundarlagið fyri samanbering so gott sum gjørligt.

Verkætlanarbólkurin hevur eisini sett seg í samband við skúlaleiðslurnar í Fuglafjarðar skúla, Runavíkar skúla og Skúlatrøð fyri at fáa ítøkiligar upplýsingar um lærugreinaútboð, íløgutørv og samstarvskostnaðir. Upplýsingarnar frá skúlaleiðslunum eru eisini nýttar sum grundarlag undir kanningini.

### *2.1 Verkætlanarbólkur*

Í verkætlanarbólkinum eru fólk, sum sita í skúlastýrinum í Skúlanum í Eysturkommunu og skúlastýrinum í Fuglafjarðar skúla, umboðandi foreldrini. Varaskúlastjórin og ein lærari í Skúlanum í Eysturkommunu eru eisini í verkætlanarbólkinum, og hava hesi serligar førleikar innan fólkaskúlaøkið. Harumframt eru samskiparar settir at skipa fundirnar hjá verkætlanarbólkinum, og at stýra arbeiðnum á ein slíkan hátt, at endamálið verður nátt.

### *2.2 Arbeiðssetningur*

Arbeiðssetningurin frá 31. mars 2014 skal tillagast soleiðis, at verkætlanarbólkurin kannar møguleikar fyri samstarvi um felags framhaldsdeild við Runavíkar- ella Klaksvíkar kommunu.

Umráðandi er, at sami leistur verður nýttur sum í "Kanning um Felags Skúlabygnað, 24. juni 2015", fyri at grundarlagið fyri samanbering er so gott sum gjørligt.

Verkætlanarbólkurin skal sostatt kanna fylgjandi:

- Lýsa møgulig samstørv við Runavík ella Klaksvík
    - Fleiri viðurskifti eru longu lýst í tilmælinum frá 30. juni 2014, og skulu hesar upplýsingar endurnýtast eftir besta førimuni.

Ítøkilig viðurskifti, ið skulu lýsast í mun til ymiskar samstarvsmøguleikar:

- Næmingagrundarlag
- Læraratoymi – herundir fakliga umhvørvið hjá lærarum
- Evt. íløgur ella kostnaður av samstarvi
- Skúlabarnaflutningur (km og kr.). Herundir hvussu næmingaflutningur kann skipast, og hvørja ávirkan tað hevur at flyta børn úr nærumhvørvi
- Hvørja ávirkan og ábyrgd kemur Eysturkommuna at hava í einum møguligum samstarvi
- Lærugreinaútboð

Um verkætlanarbólkurin metir, at neyðugt er at taka onnur viðkomandi viðurskifti upp til viðgerðar, sum kunnu gera arbeiðið uppaftur betri, er bólkurin altíð vælkomin at venda sær til kommununa.

### *2.3 Tíðarætlan*

Verkætlanarbólkurin gjørdi kanningina í tíðarskeiðnum frá 24. februar til 26. apríl 2016. Kanningin er á yvirskipaðum stigi, og farið verður ikki í smálutir innan ymisku evnini.

## 3.0 Lýsing av møguligum samstørvum við Runavík og Klaksvík

Verkætlanarbólkurin hevur lýst møgulig samstørv við Runavík og Klaksvík í mun til ítøkiligu viðurskiftini, sum tey eru í núverandi samstarvi við Fuglafjarðar skúla.

### *3.1 Næmingagrundarlag*

Lýsingin av næmingagrundarlagnum er gjørd við støði í næmingatølum frá 1. til 8. flokk í núverandi støðu. Hetta tí verkætlanarbólkurin metir, at eitt nýtt framtíðarsamstarv í fyrsta lagi fer at byrja í 2017. Verkætlanarbólkurin hevur eisini ta áskoðan, at eitt samstarv um framhaldsdeildina eigur at fevna um flokkarnar 8., 9. og 10. flokk.

Í tilmælinum um framhaldsdeildina frá 30. juni 2014 verður staðfest, at størri skúlaeindin er, fleiri eru flokkarnir. Lýsingin av næmingagrundarlagnum staðfestir, at somu viðurskifti framvegis eru galdandi í dag.

<u>Skúlin í Eysturkommunu og Runvíkar kommunu</u>

Eitt samstarv um felags framhaldsdeild millum Eysturkommunu og Runavíkar kommunu hevur komandi 8 árini eitt næmingatal í hvørjum árgangi ímillum 66 og 88 næmingar.

| Skúlin í Eysturkommunu og Runavíkar skúla - Næmingagrundarlag | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Skúli** | **8. fl.** | **7. fl.** | **6. fl.** | **5. fl.** | **4. fl.** | **3. fl.** | **2. fl.** | **1. fl.** | **sk.sp.** | **Tils.** |
| Skúlin í Eysturkommuna | 18 | 31 | 29 | 30 | 39 | 32 | 27 | 37 | | 243 |
| Skála Skúli | 0 | 14 | 7 | 14 | 7 | 14 | 11 | 15 | 0 | 82 |
| Runavíkar Skúli | 56 | 42 | 40 | 39 | 41 | 36 | 24 | 34 | | 312 |
| Oyndafjarðar skúli | 0 | 1 | 2 | 1 | 0 | 2 | 4 | | 0 | 10 |
| **Tal av næmingunum í árganginum** | **74** | **88** | **78** | **84** | **87** | **84** | **66** | **86** | **0** | **647** |
| Tal av flokkum | 3 | 4 | 3 | 4 | 4 | 4 | 3 | 4 | | 29 |

Skúlin í Eysturkommunu og Klaksvíkar kommunu

Eitt samstarv um felags framhaldsdeild millum Eysturkommunu og Klaksvíkar kommunu hevur komandi 8 árini eitt næmingatal í hvørjum árgangi ímillum 95 og 124 næmingar.

| Skúlin í Eysturkommunu og Skúlatrøð - Næmingagrundarlag | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Skúli** | **8. fl.** | **7. fl.** | **6. fl.** | **5. fl.** | **4. fl.** | **3. fl.** | **2. fl.** | **1. fl.** | **sk.sp.** | **Tils.** |
| Skúlin í Eysturkommuna | 18 | 31 | 29 | 30 | 39 | 32 | 27 | 37 | | 243 |
| Skúlatrøð | 77 | 75 | 77 | 79 | 70 | 63 | 74 | 70 | | 585 |
| Haraldssunds skúli | | 1 | | | | | 1 | | | |
| Húsar/syðradals skúli | | 1 | | | | | | 1 | | |
| Kunoyar skúli | | | | | 2 | 2 | 1 | 1 | | |
| Skúlin á Fossánesi | | 7 | 4 | 7 | 4 | 5 | 4 | 6 | | |
| Viðareiðis skúli | | 9 | 3 | 3 | 7 | 3 | 6 | 8 | | |
| **Tal av næmingunum í árganginum** | **95** | **124** | **113** | **119** | **122** | **105** | **113** | **123** | **0** | **828** |
| Tal av flokkum | 4 | 5 | 5 | 5 | 5 | 4 | 5 | 5 | | 38 |

Skúlin í Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommuna

Í verandi samstarvi millum Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu er næmingatalið komandi 8 árini ímillum 45 og 58 næmingar í hvørjum árgangi.

| Skúlin í Eysturkommunu og Fuglafjarðarskúli - Næmingagrundarlag | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Skúli** | **8. fl.** | **7. fl.** | **6. fl.** | **5. fl.** | **4. fl.** | **3. fl.** | **2. fl.** | **1. fl.** | **sk.sp.** | **Tils.** |
| Skúlin í Eysturkommuna | 18 | 31 | 29 | 30 | 39 | 32 | 27 | 37 | | 243 |
| Fuglafjarðar skúli | 32 | 20 | 16 | 26 | 19 | 19 | 22 | 18 | | 172 |
| **Tal av næmingunum í árganginum** | **50** | **51** | **45** | **56** | **58** | **51** | **49** | **55** | **0** | **415** |
| Tal av flokkum | 2 | 2 | 2 | 3 | 3 | 2 | 2 | 3 | | 19 |

Um Eysturkommuna velur at flyta sínar næmingar úr skúlanum er ikki óhugsandi, at framhaldsdeildin í Fuglafirði missir sítt tilverugrundarlag.

### *3.2 Lœraratoymi – herundir fakliga umhvørvið hjá lærarum*

Ein stutt lýsing av læraratoymum í núverandi støðu er gjørd á síðu 12 í tilmælinum um framhaldsdeildina frá 30. juni 2014. Niðurstøðan er, at í Fuglafjarðar skúla er lærarahópurin í framhaldsdeildini avmarkaður, og tí er trupult at skipa eitt fakligt toymissamstarv fyri lærarar innan ymisku lærugreinarnar. Á síðu 21, sum fevnir um lýsing av møguligum framtíðar samstørvum, er eisini lýst, at jú fleiri størv eru, jú størri eru sannlíkindini fyri, at fleiri lærarar eisini eru útbúnir innan somu sergrein.

Størri framhaldsdeildin er, fleiri eru møguleikarnir fyri at skipa læraratoymi bæði fakliga og námsfrøðiliga, og at stigbýta undirvísingina í einstøku lærugreinunum; men er skúlin ov stórur, kann gerast trupult at savna lærarar. Ein miðal skúli er møguliga ein góð eind fyri at skapa góðar karmar fyri læraratoymum og fakligum samstarvi. Í síðsta enda er tað helst ikki støddin á skúlanum, sum er avgerandi, men heldur hvussu skúlin verður skipaður í innskúling, miðdeild, framhaldsdeild ella í mun til fakligt býti av undirvísingini av næmingunum í somu lærugrein.

Í tilmælinum um skúlabygnað og læriumstøður frá 4. juli 2014, sum er gjørt í Mentamálaráðnum, eru námsfrøðiligu og fakligu umstøðurnar hjá lærarum nærri lýstar. Serliga punktini 3.6 Sosialur felagsskapur, 3.7 Námsfrøðiliga umhvørvi í skúlanum og 3.8 Lærarafórleiki frá síðu 16 til 19 viðgera hesi evni. M.a. verður nevnt, at samstarv millum lærarar ger undirvísingina meira fjølbroytta, og gott lærarasamstarv er við til at leggja lunnar undir eina dygga undirvísing. Eisini verður víst á, at ein høvuðsfortreyt fyri at tryggja næminginum góðar lærimøguleikar er ávíst næminga- og lærаratal, bæði fyri at veita næminginum fleiri sosialar relatiónir at velja ímillum og hollan fakligan førleika í øllum lærugreinum og lærugreinaøkjum. Harumframt verður nevnt, at í einum stórum skúla ella skúlaøki er møguligt at seta lærarar við serkunnleika innan ymisk øki bæði faklig og námsfrøðilig.

Í tilmælinum hjá Mentamálaráðnum verður ein stórur skúli lýstur, sum ein skúli við fleiri enn 300 næmingum. Sambært hesum er talan um ein stóran skúla, bæði um hildið verður fram at samstarva við Fuglafjørð, ella um Eysturkommuna velur eitt samstarv við Runavík ella Klaksvík. Torført at siga, hvat skúlasamstarv gagnar næmingunum best. Tað, at ein skúlaeind er dupult so stór sum ein onnur, gevur ikki trygd fyri dupult so góðum skúla.

### *3.3 Evt. íløgur ella kostnaður av samstarvi*

Óansæð um Eysturkommuna skal samstarva við Fuglafjarðar, Runavíkar ella Klaksvíkar kommunu, kann verða tørvur á íløgum.

Í tilmælinum frá 30. juni 2014 um framhaldsdeildina í Eysturkommunu verður mælt til, at ein møgulig íløga eigur at verða býtt millum samstarvskommunurnar í mun til næmingatalið í teimum ymisku kommununum. Hóskandi er at brúka næmingatalið frá 1. til 9. flokk sum grundarlag, soleiðis at býtið av íløgukostnaðinum verður so rættvíst sum gjørligt.

10. flokkur er ikki kravdur, og er talið av næmingum, sum koma í 10. flokk, møguliga ymiskt frá ár til ár. Hóast hetta eigur ein møgulig íløga, sum bert fevnir um 10. flokk, eisini at verða býtt millum samstarvskommunurnar í mun til næmingatalið frá 1. til 9. flokk. Hetta tí næmingatølini frá ymisku kommununum í miðal fara at verða tey somu, um roknað verður yvir eitt 9 ára tíðarskeið. Slík felagsbygging ger, at allir samstarvspartar vísa stóra virðing og ábyrgd fyri skúlaeindini.

<u>Runavík</u>
Runavíkar kommuna hevur fyri nøkrum árum síðani bygt nýggjan skúla, Skúlin við Løkin. Í Skúlanum við Løkin ganga børnini frá 4. flokki til og við 10. flokk. Um næmingar í framhaldsdeildini úr Eysturkommunu fara til Runavíkar at ganga í skúla, væntar skúlastjórin, Durita Joensen, at tað koma at verða avbjóðingar innan hølisviðurskiftini. Trýstið á fak- og flokshølini veksur, og loysnir mugu tískil finnast. Skúlastjórin metir tó, at kommunurnar, sum hava hølisviðurskiftini um hendi, og skúlin kunnu samskifta um hetta og finna felags loysnir.

Øll í Skúlanum við Løkin eru sera væl nøgd við skúlan, og hava tey brúkt nógv ár at fáa hesar karmarnar. Tey kenna alt til at vera í fleiri ymiskum bygningum. Tað er avmarkandi, og tá er ikki møguligt at fáa tað sama burturúr, hvørki fyri næmingar ella lærarar. Tað hevur eisini stóran týdning, at aðrir hentleikar eru í nærumhvørvinum, so øll kunnu ganga til ítróttahøll, fimleikahøll, fótbóltsvøll o.a.

Næmingatalið fyri hvønn flokk í framhaldsdeildini í Eysturkommunu fevnir í miðal um tveir flokkar. Hetta merkir, at samlaða talið av næmingum í framhaldsdeildini, sum koma úr Eysturkommunu í miðal verður 90 til 100 næmingar. Ein framtíðar bygging eigur at verða langtíðartryggjað, og tí metir verkætlanarbólkurin, at ein útbygging í Runavík eigur at taka støði í, at minst 100 næmingar koma afturat. Um støði verður tikið í, at tað verða bygd vanlig undirvísingarhølir til 100 næmingar, verður kostnaðurin í minsta lagi 25 mió.kr. Metingin tekur støði í kostnaðarmetingini á síðu 15 í kanningini um felags skúlabygnað frá 24. juni 2015, sum byggir á miðal kostnaðir fyri nýggjastu skúlabyggingarnar í Føroyum.

Áður nevndi leistur í sambandi við íløgubýtið kann verða nýttur, ella kommunurnar býta kostnaðin millum sín. Hugsast kann, at Runavíkar kommuna ynskir, at Eysturkommuna ber kostnaðin av eini møguligari útbygging, grundað á, at teimum ikki tørvar hesa útbygging.

Árligi kostnaðurin fyri hvønn næming í framhaldsdeildini í Runavík er í løtuni kr. 15.000. Í núverandi samstarvið við Fuglafjarðar skúla er árligi næmingakostnaðurin kr. 16.000. Eitt samstarv við Runavíkar kommunu er sostatt kr. 1.000 bíligari fyri hvønn næming um árið í mun til núverandi samstarv.

Klaksvík

Skúlarnir í Klaksvík vóru lagdir saman í ein skúla í 2015. Skúlabygging verður framd í løtuni, og 1. byggistigið verður liðugt í 2018. Skúlastjórin á Skúlatrøð, Vagn Foldbo, metir ikki, at tað verður tørvur á íløgum til skúlabygging, um næmingarnir í framhaldsdeildini úr Eysturkommunu koma til Klaksvíkar at ganga í skúla. Tá 1. byggistig verður liðugt, verða nóg mikið av hølum.

Skúlin í Klaksvík liggur mitt í býnum, og tískil kunnu øll ganga til aðrar hentleikar, so sum ítróttahallir, svimjihøll og fótbóltsvøll.

Sjálvt um tað ikki verður neyðugt við eini íløgu í hesum samstarvinum innan stutta tíð, verður helst neyðugt at gera avtalur við Klaksvíkar kommunu um íløguviðurskiftini.

Árligi kostnaðurin fyri hvønn næming í framhaldsdeildini í Klaksvík er í løtuni kr. 14.000. Í mun til núverandi samstarv, verður eitt samstarv við Klaksvíkar kommunu sostatt kr. 2.000 bíligari fyri hvønn næming árliga.

Fuglafjørður

Á síðu 15 í kanningini um felags skúlabygnað frá 24. juni 2015, er eitt realistiskt boð uppá eina framhaldsdeild í Fuglafirði gjørt. Hetta boð liggur um 45 milliónir krónur, og vil Eysturkommuna koma at gjalda helvtina av hesum kostnaðinum svarandi til 22,5 mió kr.

### *3.4 Skúlabarnaflutningur*

Óansæð hvønn skúla kommuan ynskir at samstarva við, er neyðugt við eini bussleið. Sum útgangsstøði fær kommunan endurgoldið helvtina av bíligastu farleið til framhaldsdeildina. Í sambandi við hvørja ávirkan tað hevur at flyta børn úr nærumhvørvinum, verður víst til síðurnar 15 og 23 í tilmælinum frá 30. juni 2014 um framhaldsdeildina í Eysturkommunu, har evnið er viðgjørt.

Runavík
Sum støðan er í dag, er Eysturkommuna ikki partur av eini skipaðari farleið millum Eysturkommunu og Skálafjørðin. Um samstarv skal takast upp við Runavíkar kommunu, er møguligt at gagnnýta verandi bussleiðir hjá Bygdaleiðum, men so krevst, at skúli og næmingar laga seg til ta almennu ferðaætlanina hjá Bygdaleiðum, ella at hon verður lagað til broytta tørvin. Hetta merkir, at skúlabarnaflutningurin má takast upp til viðgerðar, so avvarandi partar finna felags loysnir. Eisini er møguligt at víðka Leið 410 (Fuglafjørður – Gøtudalur – Klaksvík) til at fevna um Runavík.

Tað er eisini møguligt, at Eysturkommuna skipar egnan skúlabarnafluting. Sambært John Olsen, stjóra hjá AP Bussum, er kostnaðurin fyri ein busstúr til Runavíkar 1000 kr. + mvg. Leysliga mett verður helst neyðugt við trimum túrum um dagin hesar tíðir: kl. 7:30, kl. 12:30 og kl. 14:30. Onkrar túrar verður ivaleyst tørvur á tveimum bussum, t.d. kl. 7:30 og kl. 14:30. Tilsamans gevur hetta fimm túrar um dagin, svarandi til 5.000 kr. + mvg. Tað eru 198 skúladagar í einum ári. Samlaði kostanðurin fyri skipaðan skúlabarnafluting verður sostatt 990.000 kr + mvg. Av hesi upphædd fær kommunan endurgoldið 50% av bíligasta flutningi millum Eysturkommunu og Runavík frá Mentamálaráðnum.

Klaksvík
Um samstarv um framhaldsdeild verður tikið upp millum Skúlan í Eysturkommunu og Skúltrøð er hugsandi, at verandi skipan um skúlabarnaflutning kann brúkast. Hendan skipan kostar 598.000 kr árliga, harav umleið helvtin verður endurgoldin av landinum sambært kunngerð nr. 115 frá 22. november 2000.

Um næmingarnir skulu til Klaksvíkar, verður neyðugt at Eysturleiðin og Bygdaleiðir til Klaksvíkar verða samskipaðar.

Fuglafjørður
Í sambandi við, at Fuglafjarðar skúli byrjar nýtt samstarv um 10. flokk saman við Stranda skúla og Skúlanum í Sunda kommunu eftir summarfrítíðina, koma nýggjar útreiðslur í hesum sambandi. Verkætlanarbólkurin hevur ikki kannað hesi viðurskifti nærri, og her er m.a. eisini talan um, at lærugreinar verða í Tórshavn.

### *3.5 Ávirkan og ábyrgd í einum møguligum samstarvi*

Í sambandi við ávirkan og ábyrgd í einum møguligum samstarvi, verður í fyrstu atløgu víst til hesi viðurskifti á síðu 14 og 15 í tilmælinum um framhaldsdeildina frá 30. juni 2014, har lógargrundarlagið er nærri lýst.

Fólkaskúlalógin hevur m.a. hesar ásetingar um samstarv:

*§ **31**. Tveir ella fleiri skúlamyndugleikar á staðnum kunnu ganga saman í eitt skúlasamband til heilt ella lutvíst at skipa síni skúlaviðurskifti felags í øki skúla-myndugleikanna. Áðrenn avgerð verður tikin um hetta, skulu íbúgvarnir í teimum økjum, sum skúlasambandið verður at fata um, hava havt høvi at sagt sína hugsan um málið á einum fundi, sum teir einstøku skúlamyndugleikarnir á staðnum skipa fyri.*

*Stk. 2.[4)] Greiniligari reglur um samarbeiði og um val av felagsskúlastýri og um, hvørt og hvussu teir einstøku skúlamyndugleikarnir skulu kunna fara burtur úr felagsskapinum, verða at seta í ein sáttmála, sum landsstýrismaðurin góðkennir, smbr. § 57, stk. 5.*

Í núverandi støðu hevur Eysturkommuna lítla beinleiðis ávirkan á og ábyrgd av framhaldsdeildini í Fuglafjarðar skúla. Óansæð um Eysturkommuna velur at halda fram í samstarvinum við Fuglafjarðar skúla, ella um Eysturkommuna velur at fara inn í eitt nýtt samstarv við Runavík ella Klaksvík, so verður neyðugt at gera ein samstarvssáttmála, sum tryggjar, at Eysturkommuna fær javnbjóðis ávirkan og ábyrgd í mun til framhaldsdeildina. Í veruleikanum hevur kommunan lítla ávirkan á innihaldið í skúlanum, men hevur stóra ávirkan á fíggjarligu karmarnar. Ávirkanin, sum foreldrini hava, er umvegis skúlastýrið.

Tað kann hugsast, at Eysturkommuna kann samráða seg til ein samstarvssáttmála við javnbjóðis ávirkan og ábyrgd, grundað á, at næmingarnir í Eysturkommunu gera, at kommunan samstarva verður við, fær fleiri møguleikar saman við Eysturkommunu. Til dømis kann í sáttmálanum vera ásett, at eitt foreldraumboð og kommunuumboð frá Eysturkommunu altíð eru við í skúlastýrinum.

### *3.6 Lærugreinaútboð*

Í tilmælinum um skúlabygnað og læriumstøður frá 4. juli 2014, sum er gjørt í Mentamálaráðnum undir punktinum 3.9 Valtilboð og 3.10 10. flokkur, frá síðu 19 til síðu 22, eru møguleikarnir innan vallærugreinatilboð lýstir.

<u>8. og 9. flokkur</u>

Lærugreinaútboðið í 8. og 9. flokki er á leið tað sama í skúlunum. Tó eru breytir skipaðar í Runavíkar skúla, har Runavík og Toftir samstarva um breytirnar. Tað er eitt krav at skúlarnir bjóða týskt og alis- og evnafrøði í 8. og 9. flokki.

| **8. og 9. flokkur** | **Fuglafjarðar skúli** | **Runavíkar skúli** | **Skúlatrøð** |
|---|---|---|---|
| Týskt | x | x | x |
| Alis- og evnafrøði | x | x | x |
| Heimkunnleiki | x | | |
| Tónleikur | x | | |
| Myndlist/glaslist | x | | |
| Smíð | x | | |
| Leiklist | x | | |
| Motorlæra | x | | |
| Teldulæra | x | | |
| Fótbóltsbreyt:<br>Fótbóltsvenjing, kropslig venjing, ástøði og sunn lívsførslu | | x | |
| Samfelagsbreyt:<br>Samfelagsviðurskifti, lokal-, lands-, ríkis- og altjóða politikkur, samskifti og miðlar | | x | |
| Rørslubreyt:<br>Fimleik, ymisk bóltspøl og frælsan ítrótt | | x | |
| Handaliga breyt:<br>Handarbeiði, smíð, evning, heimkunnleiki og tónleik | | x | |
| Sjóvinna | | | x |
| Smíð, motorlæra og el | | | x |
| Evning, handarbeiði og heimkunnleiki | | | x |
| Miðlar, tónleikur og tónlist | | | x |

Sum talvan vísir, er lærugreinaútboðið so at siga tað sama fyri skúlarnar í 8. og 9. flokki. Munurin er at í skúlunum í Runavík og Klaksvík eru fleiri lærugreinar knýttar saman í eina breyt, meðan tær standa sum einkultar lærugreinar í Fuglafirði.

<u>10. flokkur</u>

Lærugreinaútboðið í 10. flokki tekur støði í skúlaárinum 2015/2016 fyri Runavíkar skúla og Skúlatrøð. Fyri Fuglafjarðar skúla er framtíðarsamstarvið ímillum Fuglafjarðar-, Stranda- og Skúlan við Streymin nýtt sum grundarlag. Í Fuglafirði verða 8 breytir, í Runavík eru 9 og í Klaksvík eru 12. Í núverandi støðu samstarva Fuglafjarðar skúli og Skúlatrøð um breytalærugreinarnar.

| 10. flokkur | Fuglafjarðar skúli | Runavíkar skúli | Skúlatrøð |
|---|---|---|---|
| Føroyskt | x | x | x |
| Danskt | | x | x |
| Enskt | x | x | x |
| Alisfrøði | x | x | x |
| Evnafrøði | x | x | x |
| Støddfrøði | x | x | x |
| Stylistbreyt | x | | |
| Handverkarabreyt | x | x | |
| Ítróttarbreyt | x | x | |
| Sjóvinnubreyt | x | x | |
| Køksbreyt | x | x | |
| Sniðgevingsbreyt | x | x | |
| Sangleikabreyt | x | x | |
| eSport-Gaming | x | | |
| | Næmingurin velur eitt av hvørjum | | |
| | | | |
| Náttúru- og djórabreyt | | x | |
| Tónleikabreyt | | x | |
| Miðla- og samfelagsbreyt | | x | |
| | | Næmingurin velur tríggjar breytir og fær tvær | |
| KT-breyt | | | x |
| Miðlabreyt | | | x |
| Kostbreyt | | | x |
| Vísindabreyt | | | x |
| Handverksbreyt | | | x |
| Íverksetarabreyt | | x | x |
| | | | Næmingar velja eina av hesum breytunum mánadag |
| Tónleikabreyt | | | x |
| Málbreyt | | | x |
| Ítróttar- og sjálvsmenningarbreyt | | | x |
| Listabreyt | | | x |
| Leiklistabreyt | | | x |
| Sjóvinnubreyt | | | x |
| | | | Næmingar velja eina av hesum breytunum fríggjadag |

Sum talvan vísir, er heldur ikki stórur munur á lærugreinaútboðnum í 10. flokki.

Sostatt kann staðfestast, at lærugreinaútboðið á skúlunum er somikið fjølbroytt og líkt í vavi, at tað er ikki altavgerandi fyri, hvar samstarvast skal.